

(Mynd:EPA)

# Oljuframleiðslan í Norðsjónum minkar

**Elin Dam Egholm**

27.04.2015 - 22:41

Oljan.fo

Skal man trúgva Nordea, lækkar oljuframleiðslan hjá Mærsk í Norðsjónum úr 60.000 tunnum um dagin í fjør, til 28.000 tunnur um dagin í 2024. Tað skrivar Jyllandsposten.

Svenski íløgubankin SEB væntar eisini eitt hall í framleiðsluni av olju hjá Mærsk áljóðandi 5-10% komandi árini.

Talan er tó um danska partin av Norðsjónum.

Bretsku myndugleikarnir hava júst lækkað skattin av oljuframleiðslu við 10%, alt fyri at draga fleiri íløgur til bretska partin av Norðsjónum.